## Steegmans vann í Belgia

Onnur etapa í heimsins størstu súkklukapping Tour de France hevði mál í Belgia, og hetta gjørdi, at fleiri av belgiumonnunum í feltinum høvdu hug at vísa seg. Og tað gjørdist eisini ein belgiumaður, sum vann hesa etapu. Móti endanum sluppu nakrir heilt fáir súkklarar leysir frá feltinum, tá fleiri av fresmtu súkklarunum duttu, og tí skuldi 2. etapa avgerast millum teir heilt fáu, sum sluppu undan stóra fallinum. Her endaðu tveir av belgiumonnum á belgiska súkkluliðnum, Quick Step, fremst. Vinnarin gjørdist Gert Steegmans, meðan Tom Boonen endaði á øðrum plássi.



## Fleiri endaðu á sjúkrahúsinum

Eitt stórt óhapp móti endanum av aðru etapu av Tour de France gjørdi, at fleiri av súkklarunum máttu ein túr niður á vegin at smakka asfalti. Óhappið sá so álvarsamt út, at vandi var fyri, at fleiri av súkklarunum máttu gevast í Tour de France. Millum teir, sum vóru við í óhappinum, var eisini førarin í kappingini, Fabian Cancellara, sum súkklar fyri danska, Team CSC-liðið. Tá ið súkklararnir komu á mál vísti tað seg tó, at teir flestu hævdu verið hepnir í óhappinum, men ein súkklari mátti tó gevast við einum brotnum tummilfingri. Tað var Tomas Vaitkus frá Team Discovery Channel.

# inum



*Annan róðurin á rað megnaðu kvinnurnar umborð á Sílinum at vinna, og nú sær sera gott út hjá teimum í stríðnum um meistaraheitið. Fáa tær eitt annað pláss á Vestanstevnu, so eru tær heilt vísar í at vinna meistaraheitið.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

á Vestanstevnu, sigur bátsformaðurin á Sílinum.

Møguleikin hjá kvinnunum umborð á Sílinum at tryggja sær meistaraheitið á Vestanstevnu er eisini rættiliga góður. Eitt annað pláss ger, at eingin annars bátur kann fanga tær aftur.

Vit spurdu eisini Annu, hvønn týdning ólavsøkan hevur í einum kapproðrarári.

- Nú hyggja vit fyrst og fremst fram ímóti Vestanstevnuni, har meistaraheitið skal avgerast. Tað er tó heilt víst, at vit gleða okkum til ólavsøkuna. Hon skal sjálvandi eisini vinnast, tí at vinna á ólavsøku er sum at vinna meistaraheitið, sigur Anna at enda.

manningarnar á Sílinum hava gjørt í ár. Góðu úrslitini hjá hesum báðum manningunum kunnu vónandi gera, at áhugin fyri kapproðri gerst størri millum tey ungu, og tí hevur hetta eisini stóran týdning fyri felagið, sigur formaðurin í Havnar Róðrarfelag.

# Fleiri kunnu vinna FM



*Kvinnurnar umborð á Sílinum eru ein av seks manningum, sum kunnu tryggja sær meistaraheitið á vestanstevnu í Sørvági komandi leygardag.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Fleiri av bátsmanningunum kunnu tryggjað sær meistaraheitið, tá vestanstevnuróðurin verður á skránni komandi vikuskiftið**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nú vit eru komin út í hálvan juli mánað, eru fimm av teimum sjey kapproðrunum farnir aftur um bak. Og eingin ivi er um, at kapproðraráhugaði langt síðani hava gjørt sær eina mynd um, hvørjir bátar fara at vinna meistaraheitið.

Komandi vikuskiftið stendur so sætti róðurin fyri framman á vestanstevnu í Sørvági, og longu nú kann meistaraheitið avgerast í flestu av róðrunum.

### Tveir skulu bara fullføra

Í tveimum av bátaflokkunum verður bert neyðugt hjá fremstu bátunum í FM-kappingini at fullføra róðurin á vestanstevnu fyri at tryggja sær meistaraheitið.

Hjá 10-mannaførunum hevur Eysturoyingur vunnið allar róðrarnar í ár framman fyri Vestmenning, og sostatt eru teir 10 stig fremst í FM-kappingini. Av tí at tað bert hava verið tríggir bátar við í kappingini hjá 10-mannaførunum í ár, so er heilt víst, at Eysturoyingur í minsta lagi fær átta stig afturat, og tí skulu teir bara fullføra róðrarnar á vestanstevnu og ólavsøku fyri at tryggja sær meistaraheitið.

Tað sama er galdandi fyri Jarnbard í kappingini hjá 6-mannaførum við kvinnum. Tær eru í løtuni 11 stig framman fyri Kollfirðing í FM-kappingini, og eisini hjá teimum hava bert tríggir bátar verið við síðstu róðrarnar. So um tær koma á mál í Sørvági og á ólavsøku, so kunnu tær rópa seg føroyameistarar.

### Fýra aðrir kunnu avgera

Tað eru tó heili fýra bátsmanningar afturat Eysturoyingi og Jarnbardi, sum kunnu tryggja sær meistaraheitið í Sørvági.

Hjá 5-mannaførum við gentum er Hvassi í løtuni níggju stig framman fyri Drekan, og tí kunnu genturnar úr Sundalagnum við einum sigri á vestanstevnu vera vísar í gullheiðursmerkjunum í FM-kappingini.

Eisini kvinnurnar umborð á Sílinum kunnu vinna meistaraheitið í Sørvági. Tær eru nevniliga eisini níggju stig framman fyri Ørnina og Fípuna Føgru, so ein sigur gevur eisini teimum fyrsta plássið í FM-stríðnum.

Hjá 6-mannaførum við monnum var kappingin jøvn og góð fyrstu róðrarnar, men síðstu tríggjar róðrarnar er Sundabáturin bara blivin sterkari og sterkari. Í løtuni er hann átta stig framman fyri Tvørabátin í FM-kappingini, og tí kann eisini hann tryggja sær meistaraheitið á vestanstevnu við einum sigri.

Tað sama er galdandi fyri 8-mannafarið Heiðabátin, sum er 11 stig framman fyri Argjabátin á øðrum plássi. Teir hava í roynd og veru bert brúk fyri einum triðja plássi á vestanstevnu fyri at vera vísir í meistaraheitinum.

### Hørð kapping hjá dreingjunum

So samanumtikið er tað bert í einum bátaflokki, at tað er stríð um meistaraheitið. Hetta er hjá 5-mannaførum við dreingjum, har Havfrúgvin í løtuni er fýra stig framman fyri Sílið. So ein sigur til Havfrúnna á vestanstevnu setur teir í eina sera góða støðu, meðan Sílið tó eisini kann avgera meistaraheitið til egnan fyrimun, um teir vinna róðrarnar á bæði vestanstevnu og á ólavsøku.